## FBI skal kanna deyðsfall

Síðani forsætisráðharrin í Georgia, Zunab Zvania, varð funin deyður seinasta mikudag, hava gitingar verið um, at hann var vorðin myrdur, og tí hava georgisku myndugleikarnir nú biðið serfrøðingar hjá amerikonsku samveldisløgregluni FBI koma til Georgia at kanna málið.

Zunab Zvania og ein annar politikari, Raul Jusupov, vórðu funnir deyðir í íbúðini hjá Jusupov, og myndugleikarnir kunngjørdu seinni, at teir vóru deyðir av eitran frá einum gassleka. Men keldur í Georgia hava sett spurnartekin við hesa frágreiðingina, og bløð í Russlandi hava skrivað, at teir báðir deyðu høvdu fleiri skotsár.

Serfrøðingarnir hjá FBI skulu eisini kanna umstøðurnar í sambandi við eina bumbuspreinging í Georgia tann 31. januar, tí ein ávísur illgruni er um, at deyði forsætisráðharrans hevði samband við bumbuspreingingina.

## Færri sigarir

Kuba er kent fyri sínar sigarir, men nú hava myndugleikarnir har sett eina sera stranga roykilóg í gildi.

Lógin sigur millum annað, at tað er bannað at roykja á flestu arbeiðsplássum, allar sigarettmaskinur skulu beinast burtur, og tað er ikki loyvt at selja tubbaksvørur nærhendis skúlum. BBC veit kortini at siga, at myndugleikarnir hava ikki lagt serliga stóran dent á at greiða fólki frá nýggju lógini, og at mong tí eru í iva um, hvussu hon skal tulkast.

Kubanski forsetin, Fidel Castro, er ofta settur í samband við tær væl umtóktu kubansku sigarirnar, sjálvt um hann legði av at roykja fyri tjúgu árum síðani. Myndugleikarnir í Kuba siga, at árliga doyggja umleið 6.000 kubanar av sjúkum, ið standast av royking.

## Kendar tenn á framsýning

Tveir jakslar hjá kenda norska pólgranskaranum Roald Amundsen verða í hesum døgum sýndar fram á einari framsýning í býnum Moorhead í amerikanska statinum Minnesota.

Roald Amundsen var í Moorhead tann 24. mars í 1927, har hann helt fyrilestur um eina av sínum mongu pólferðum. Meðan hann var í býnum, fekk hann ilt í tveir jakslar, og tannlæknin Albert Hallenberg gjørdi av at taka teir. Tannlæknin goymdi jakslarnar, men lat seinni eitt savn í býnum fáa teir í varðveitslu, og teir eru helst tær seinastu leivdirnar av tí kenda pólgranskaranum, sum doyði í einari flogvanlukku í juni í 1928.

Roald Amundsen er serliga kendur sum tann, ið fyrstur kom á Suðurpólin. Tað var tann 14. desember í 1911. Hann var kortini ikki einsamallur. Í ferðalagi hansara vóru fýra menn og 52 hundar.

## 80 ára gamal bankarænari

Mánadagin varð ein 80 ára gomul kona í Eysturríki dømd at gjalda 2.500 krónur í bót, tí hon royndi at ræna ein banka.

Kvinnan var farin inn í ein banka í Wien við einari leikaskammbyrsu. Inni í bankanum hevði hótti hon eitt av starvsfólkunum við skammbyrsuni, men pengar fekk hon ongar. Ístaðin fyri endaði hon á løgreglustøðini til avhoyringar. Har greiddi tann gamla konan frá, at hon hevði sjálvandi ikki ætlað at ræna bankan, og at hon hevði bara ætlað hetta sum skemt.

Men løgreglan og rætturin hildu ikki, at hetta var serliga skemtiligt. Tí bleiv konan dømd at gjalda 2.500 krónur í bót, men hon slapp kortini undan at fara í fongsul, skrivar AP.

UTTAN ÚR HEIMI

# Prestur neyðtók smádrong fleiri ferðir

**Fyrrverandi amerikanski presturin Paul Shanley er funnin sekur í at hava neyðtikið ein seks ára gamlan drong fleiri ferðir**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tann 74 ára gamli fyrrverandi katólski presturin kann vænta sær lívlanga fongsulsrevsing, eftir at rætturin í Cambridge í statinum Massachusetts hevur funnið hann sekan í neyðtøku og øðrum kynsligum ágangi.

Høvuðsvitnið ímóti prestinum var ein 27 ára gamal maður. Hann greiddi frá, at tá hann var seks ára gamal, var hann regluliga í kirkjuni, har Paul Shanley var prestur. Undir avhoyringini greiddi maðurin frá, at hann bleiv neyðtikin fleiri ferðir.

– Tað var ræðuligt. Prestur segði, at eingin fór at trúgva mær, um eg segði, hvat var hent. Eg tordi heldur ikki at siga nakað, sjálvt um hetta stóð við í seks ár, segði maðurin.

Sambært AP hava minst 24 aðrir menn greitt løgregluni frá, at teir vóru eisini fyri kynsligum ágangi frá Paul Shanley. Skjøl hjá kirkjuni hava avdúkað, at sum prestur var hann fyri kynsligum sambandi ímillum menn og dreingir, og at leiðslan í kirkjuni visti tað. Í 1967 fekk katólska kirkjan í USA ta fyrstu klaguna um Paul Shanley, men kirkjuleiðslan valdi kortini at lata hann halda fram í embætinum og at lata hann hava samband við børn har, skrivar AP.



*Paul Shanley lurtar í rættarhølinum í Cambridge*

# Irak kann enda sum Iran

**Amerikanska stjórnin roynir av øllum alvi at forða fyri, at Irak skal fáa prestastýri og tær strongu sharia-lógirnar**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Síðani irakska tjóðartingsvalið hava fleiri shiamuslimskir leiðarar í Irak gjørt vart við, at teir ætla at skipa landsins lógir í samsvari við »Koranina og Guðs vilja«, sum teir taka til. Tað er heldur eingin ivi um, hvat tað ber í sær.

– Vit vilja ikki hava javnrættindi ímillum menn og kvinnur, tí sambært islamskari lóg eru tað menninir, sum ráða. Tað stendur í Koranini, og tað er Guðs vilji, segði ein talsmaður hjá tí máttmikla shiamuslimska leiðaranum ayatolla Yacoubi við New York Times mánadagin.

Hóast tað endaliga úrslitið av tjóðartingsvalinum ikki er kunngjørt en, er tað greitt, at shiamuslimarnir verða teir sterku á tí politiska pallinum í Bagdad, tí teir eru í meiriluta. Fyri fleiri døgum síðani ljóðaði, at flokkurin United Iraqi Alliance hevur fingið sera nógvar atkvøður og verður nógv tann størsti í tinginum.

Tað, sum ørkymlar amerikonsku stjórnina er, at aftan fyri hendan flokkin eru kreftir, sum hava gott samband við prestastýrið í grannalandinum Iran. Sambært New York Times kunnu amerikanararnir ugga seg við, at fleiri shiamuslimskir leiðarar hava talað ímóti at skipa iraksku leiðsluna eftir iranskum leisti, men teir hava kortini sagt, at tann komandi irakska grundlógin skal vera í samsvari við islamska lóg.

Rættiliga avgerandi er, hvat tann ovasti átrúnaðarligi leiðarin hjá shiamuslimunum, Ali al-Sistani, fer at gera. Hann hevur fyrr sagt, at teir átrúnaðarligu leiðararnir eiga ikki at hava nakran høvuðsleiklut á tí politiska pallinum, men seinastu tíðina hava talsmenn hansara sagt, at hann ætlar sær at gera vart við seg, um tann komandi stjórnin ikki heldur seg til fólksins vilja, skrivar New York Times.

Norski granskarin Henrik Thune sigur við Dagsavisen, at sama hvat amrikanararnir gera, so er tað greitt, at Iran fær stóra ávirkan á viðurskiftini í Irak í framtíðini.